# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG



Blað Nr. 3 - 2004

www.pedagogfelag.fo

# Oddagrein



Tað pedagogiska økið hevur rættiliga verið í andglettinum ta síðstu tíðina. Vit kunnu fegnast um, at tað hava verið tvær stórar ráðstevnur fyriskipaðar, har evnini hava verið frítíðarskúlar og trivnaðurin hjá børnunum á stovnum. Tvey tiltøk, sum eydnaðust avbera væl. Tað er sera umráðandi, at slíkar ráðstevnur verða hildnar. At vit kunnu hittast um nakað, sum vit eru felags um, og fáast við - og at vit fáa sett orð á tað pedagogiska arbeiði.

Tað er av stórum týdningi, at kunna fylgja við teimum samfelagsligu rembingunum, sum vit standa yvir fyri. Kanningar uttan úr heimi vísa, at meira og meira verður álagt starvsfólkunum, sum starvast á dagstovnunum - og hetta merkir so, at størri krøv verða sett til teirra, sum eru um børnini, meðan tey eru á stovni. Foreldur seta eisini ávíst krav til innihaldið á stovninum, og starvsfólki á stovnunum hava nógv foreldur at "fyrihalda" seg til.

Í kjalarvørrinum av hesum, hevur Tórshavnar Kommuna sett barnagarðsaldurin niður, soleiðis at skilja, at børnini nú eru yngri, tá tey byrja í barnagarði. Vit kunnu staðfesta, at hetta krevur alt meira orku til tey, sum eru um børnini á dagstovninum, og hava starvsfólk eisini gjørt vart við hesi viðurskifti á røttum stað, men tað vísir seg at vera tvørrandi vilji til at skilja hesi starvsfólkini.

Færri tímar og økt krøv til leiðslu og starvsfólk hongur als ikki saman. Høvuðsuppgávan hjá starvsfólkunum er, at kunna geva børnunum eina dygdargóða menning og ein innihaldsríkan gerandisdag, men hetta gerst sera torført við teimum broytingum, sum eru hendar innan dagstovnaøkið í Tórshavnar Kommunu. Tað er sera umráðandi, at vit sum fakbólkur rópa varskó, tá slíkar broytingar henda - og ikki bara sita hendur í favn.

Eitt annað mál, sum hevur verið nógv frammi, eru setunarviðurskiftini á einum Frítíðarskúla - hetta mál hevur eisini verið nógv umrøtt í fjølmiðlunum. Landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum hevur júst tikið avgerð í hesum málið. Eina avgerð, sum Føroya Pedagogfelag er alt annað enn nøgt við.

Vit hava eisini, sum felag, fleiri ferðir víst Mentamálaráðnum á tann vantandi tørvin á pedagogum. Tí var tað enn einaferð hugstoytt at hoyra landsstýrismannin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni siga, at tað ikki er ráðiligt at taka fleiri flokkar inn, tí búskaparligu útlitini eru so vánalig. Spurningurin er heldur, um man hevur ráð at lata vera. Tað er júst í niðurgangstíðum tað er umráðandi at útbúgva fólk - og havast skal í huga, at hvørt ár eru umleið 150 umsóknir at sleppa inn á pedagogútbúgvingina í Føroyum. Nógvir av hesum umsøkjarunum leita sær tískil til Danmarkar at útbúgva seg - og skuldi hetta ikki verið neyðugt. Tørvurin á pedagogum í Føroyum er stórur - og talan kann bert vera um politiskan illvilja við ikki at raðfesta hetta hægri.


**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jarvin Feilberg Hansen,
Tlf. 31 75 76
t-post:
jarvin@pedagogfelag.fo

**Fyrisiting:**
Jarvin Feilberg Hansen,
formaður
Katrin H. Thomsen,
fyrisitingarleiðari

**Nevnd:**
Jarvin Feilberg Hansen,
formaður.
Ann-Elisabeth Joensen,
næstform.
Bjørghild í Geil,
kassameistari.
Laila Petersen, skrivari
Gitta av Kák,
nevndarlimur.

**Útgevari:**
Føroya Pedagogfelag
Postboks 318
110 Tórshavn
Tlf. 31 75 76
Fax 31 75 73
e-mail:
pedagog@pedagogfelag.fo

**Uppseting og prent:**
Føroyaprent

**Lagt til rættis:**
Sp/f Rit&Ráð

**Seinasta freist**
at senda blaðnum
tilfar til næsta blað:
25. august 2004

Blaðið verður prentað í 1900 eintøkum, kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis.
Onnur áhugaði kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.
Loyvt er at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.

**Nýtið heimasíðuna!!!**

**www.pedagogfelag.fo**



Á heimasíðuni finnur tú m.a.:
...stovnar
...álitisfólk
...sáttmálar
...lønartalvur
...tryggingaviðurskifti
...kunningartilfar
...tíðindi
...blaðið
...slóðir til aðrar heimasíður

Felagið ynskir, at heimasíðan eisini gerst virkin og viðkomandi í dagsins kjaki. Tí heitir felagið á limirnar um at lata sítt íkast til dagsins spurningar. Sig tína hugsan – skrivið til heimasíðuna!

## Hotell – tilboð í Keypmannahavn

Pedagogfelagið hevur júst gjørt avtalu við "Hotel Guldsmeden í Keypmannahavn, soleiðis at allir limir felagsins nú hava møguleika at gista væl og fyri ein sámuligan kostnað í danska høvuðsstaðnum.

**Einkultkamar kostar 700,- kr.**
**dupultkamar 1095,- kr.**
**og eyka uppreiðing 200,- kr.**



# Setanarskriv

Felagið fer at minna stovnarnar á, at smb nýggju semjuni, skulu starvsfólk hava fingið setanarskriv í seinasta lagi 14 dagar aftaná setan – felagið skal smb.semjuna samstundis hava sendandi avrit av setanarskrivinum. – Minnist samstundis til innmeldingarseðilin

# Felagslívstrygging

Vit vilja minna limirnar á, at um tit fara í farloyvi uttan løn, kemur einki inngjald fyri felagslívstryggingina, ið er kr. 125.- mán.

Tit detta automatiskt burtur úr tryggingini um tit ikki gjalda inn sjálvi, og eru tá ikki tryggjaði. Tit fáa konto nr. við at venda tykkum til felagið.

# Úr innihaldinum


**Oddagrein** [síða 2
**Úr innihaldinum** [síða 3
**Álitisfólk skipað í landspartabólkar** [síða 4
**Fakfestivalur um frítíðarskúlarnar** [síða 5
**Pallborðið** [síða 6
**Brúkarin fær betri tænastu** [síða 8
**Úr heimi hugans** [síða 10
**Ein mennandi og spennandi námsferð í Aberdeen** [síða 12
**Læra at virka í einum sosialum felagsskapi** [síða 14
**"Supervisión var ein partur av arbeiðinum"** [síða 15
**"Supervisión er alneyðug** [síða 16
**Sirkus á dagstovni** [síða 17
**Alt ov fáir pedagogar** [síða 18
**Størri krøv til innihald** [síða 18
**Sjónarmið og viðmerking** [síða 19
**Nýggjar barnabøkur** [síða 20
**Ikki eiti á pedagogar** [síða 21



*Álitisfólkini eru til reiðar at fara til verka, og mong eru evnini at viðgera.*

# Álitisfólk skipað í landspartabólkar

## Teir ymisku bólkarnir hava nógv hugskot um, hvørji evni skulu takast upp á fundum og skeiðum

Við teimum alt fleiri dagstovnunum kring landið legst eisini til við álitisfólkum, og tí hevur Pedagogfelagið hildið tað vera bæði skilagott og neyðugt at broyta álitisfólkaskipanina soleiðis, at álitisfólkini í størri mun samstarva í hvør sínum øki í landinum. Tað er bæði kostnaðarmikið, tíðarkrevjandi og trupult at savna øll álitisfólk felagsins á einum stað. Við nýggju skipanini er eisini hugsandi, at samskifti millum álitisfólk í teimum ymisku økjunum verður enn betri, tí tey skulu nú í enn størri mun sjálv taka stig til fundir og tiltøk annars.

### Hugskotini tróta ikki

At tosa um nýggju skipanina hittust øll álitisfólkini í Havn í summar, og tey hava síðani, hvør í sínum landspartabólki, gjørt sínar hugsanir um, hvørjum evnum tey serliga skulu arbeiða við, og hvørjum skeiðsevnum mestur tørvur er á. Millum spurningarnar og evnini, álitisfólkini vilja hava betur lýst, eru:

- um ein stovnur skal hava fleiri álitisfólk, tá hann er í fleiri deildum,
- um feriur og normeringar,
- um gerandistrupulleikar í arbeiðinum,
- tagnarskyldan í arbeiðinum og í álitisfólkabólkinum,
- arbeiðstíðarreglur og at skipa arbeiðið betur,
- avspáking,
- trivnaður á arbeiðsplássinum og uppgávan hjá álitisfólkunum í tí sambandi,
- arbeiðsuppgávur hjá álitisfólkunum úti á stovninum,
- hvussu ávirka meir-inskrivingar av børnum viðurskiftini hjá starvsfólkunum,
- privat ørindi í arbeiðstíð,
- normeringar,
- avloysarar,
- samstarvið millum álitisfólk og leiðaran,
- hvussu gera vit álitisfólkaarbeiðið meira spennandi,
- bygnaðarbroytingar innan barnaansingina í Tórshavnar Kommunu,
- leikluturin hjá varaálitisfólkunum,
- at gera álitisfólkaarbeiðið meira sjónligt,
- álitisfólkainnlit í sambandi við starvssetanir,
- og hvussu er, har fleiri fakbólkar eru á sama arbeiðsplássi.

Sum skilst, so tróta hugskotini ikki.

### Tørvur á ymiskum skeiðum

Álitisfólkini vísa eisini á, hvørji evni tey halda eiga at verða tikin upp á komandi skeiðum. Millum evnini eru: Fyrisitingarlógin, og annars lógir og sáttmálar sum heild. Hvat er gott álitisfólkaarbeiði. Teldukunnleiki hjá álitisfólkum, og harvið samskifti um netið. Álitisfólk og leiðarar á sama skeið um samskifti teirra millum, og skeið fyri hjálparfólk. Meira enn ein bólkur segði frá, at flestu teirra í bólkinum vóru nývald, og tí hildu tey tørv vera á onkrum byrjanarskeiði í grundleggjandi reglum fyri álitisfólk. Onkur bólkur helst eisini, at gott hugskot hevði verið, at skipað var fyri onkrum temadegi av og á. Í hesum sambandi hava økisumboðini havt ein fund saman í hølum felagsins.

# Fakfestivalur um frítíðarskúlarnar

Í heyst var skipað fyri sokallaðum fakfestivali fyri starvsfólk í frítíðarskúlum og dagstovnum. Høvuðsevnið var frítíðarskúlar og frítíðarpedagogikkur. Í hesum sambandi nema vit við nakað av tí, Stig G. Lund, konsulentur í BUPL, og Rógvi Thomsen, sum undirvísir í pedagogikki á Føroya Læraraskúla, bóru fram. Harafturat verður tikið samanum tað, pallborðsluttakararnir høvdu at borðreiða við.

## Í frítíðini verður framtíðin fyrireikað

Tað var serliga við atliti til frítíðina hjá børnum - og serliga teimum í frítíðarskúlaaldri, at Stig G. Lund, konsulentur í BUPL, røddi. Hann er íðin talsmaður fyri frítíðarskúlaskipanini. Eini skipan, sum ikki bert skal hava børnini í varðveitslu og ansa teimum, meðan foreldrini eru til arbeiðis, men geva teimum eitt veruligt innihald og menna tey. Tí frítíðin er dýrabar. Hon er fyrireikingin til framtíðina, segði Stig G. Lund, sum ikki ivaðist í, at samfelagið eigur at geva øllum børnum møguleika at koma í frítíðarskúla.

Men í Danmark eru ikki øll, sum skilja týdningin av at geva børnunum eitt innihaldsríkt frítíðarskúlatilboð. Manga staðni halda frítíðarskúlar til í tilvildarligum hølum, sum als ikki eru egnað til endamálið, og innihaldið er mangan so sum so, segði Stig G. Lund, sum helt eina orsøk til tørvandi áhugan vera, at hvørki foreldur, politikarar ella umsiting vita rættiliga, hvat kann fara fram í einum frítíðarskúla, og hvønn týdning tað kann hava. Tað kann vera torført at seta orð á virksemið, men tað hevur við góðum úrslitum borið til í fleiri førum. Hetta var m.a. gjørt við at gera samrøður við starvsfólk - bæði pedagogar og lærarar, børn, politikarar og umsiting, um, hvat tey halda um frítíðarskúlan. Á henda hátt bar til at seta orð á innihaldið, og tað hevði í fleiri førum við sær, at fólk fingu ein annan hugburð til frítíðarskúlan.

Tey eru mong sum halda, at tað ræður um at fáa børn í skúla á so ungum aldri sum gjørligt - at fáa veruliga undirvísing. Men hesum er Stig G. Lund ikki samdur í. Hann heldur, at børn í hesum aldri læra mest, um læran kennist sum eitt spæl. Og tað er her, frítíðarskúlin kann hava sín stóra týdning. At geva børnunum ein gerandisdag við góðum innihaldi og læra tey at kenna menniskjanslig virði og sosialan hugburð.



*Stig G. Lund - Konsulentur í BUPL*

## Offur fyri tíðarfordómum

-Tað, sum børn og ung nú á døgum fáast við, er á avgerandi økjum heilt øðrvísi enn tað, børn og ung tókust við fyri bert einum ella tveimum ættarliðum síðani. Tað vil siga, at barndómur og ungdómur í Føroyum verður livdur á ein heilt annan hátt, enn tá ið flestu ástøðini um menningina av børnum og ungum vórðu gjørd. Og hóast tað verða hesi ástøði í stóran mun enn brúkt til at skilja børn og ung, og hvussu vit eru um tey.

Tað segði Rógvi Thomsen, lærari í pedagogikki á Føroya Læraraskúla, í hugleiðingum sínum um broytingar í samfelagnum seinastu hálvu øldina, serliga við atliti til samskifti millum børn og vaksin. Hann førdi fram, at til tey eirindarleysu vilkorini hjá barndóminum hoyrir, at lívið hjá børnunum skal livast í framtíðini, men samstundis liva tey undir teimum vilkorum, at tey alla tíðina eru í vanda fyri at gerast offur fyri tíðarfordómum, sum altíð eru ógvuliga ráðandi í samtíðini. Vit fáa ikki gjørt so nógv við tíðarinnar gongd, men okkara fatan av barndóminum, vilkorum og møguleikum fáa vit gjørt nakað við, segði Rógvi Thomsen.

### Familjumynstrið nógv broytt

Rógvi segði, at ein hin størsta broytingin seinastu fjórðingsøldina er í umhvørvinum, barnið kemur úr. Stóra broytingin er í familjumynstrinum og sostatt eisini í uppalingini, og hann vísti á familjustøðuna hjá børnunum í einum tilvildarligum sjeynda flokki í Havn. Tað vísti seg, at av 21 børnum búgva 9 ikki saman við báðum foreldrunum. Av hesum 9 er bert eitt,


*Rógvi Thomsen*

sum ikki hevði fingið ein nýggjan papp-pápa at búgva saman við. Øll børnini búgva hjá mammuni. Seks teirra hava fingið nýggj systkin. Av teimum, sum búgva saman við báðum foreldrunum, eru tvey, sum hava eldri hálvsystkin, t.v.s., at tey eisini eru ein partur av tí nýggja familjumynstrinum.

## Í dag velja vit

- Í mun til støðubundna samfelagið, vit eru komin úr, velja vit í dag alla tíðina, - bæðu sum yngri og eldri. Hesi støðugu val ávirka okkara identitet. Børnini velja t.d. leiku, video, mat og klæði, og sum vaksin velja vit vinir, parforhold, seksualitet, rúsevni, kappingar, ítrótt, arbeiði o.m.a. Hesi valini krevja, at vit frá barnsbeini læra at velja, meta um og velja millum valmøguleikar, segði Rógvi og legði dent á, at tað krevur av okkum vaksnu, at vit í smáum læra børnini at velja, velja í mun til sín og í mun til felagsskapin, at vit læra tey at knýta innilig bond, so tey eru klár at fara út at velja uttan at missa seg burtur, og somuleiðis at vit vísa á, hvat vit halda er rangt og rætt, uttan at forða børnunum í at velja øðrvísi.

## Geva barninum førleikar

Tað, sum ræður um er, at vit geva barninum sosialar førleikar at duga at liva í og við umstøðunum, tað er í, at vera sosialt tilbúgvin og geva barninum málsligar og aðrar samskiftisførleikar, segði Rógvi, sum gav hetta boð upp á tað kompetenta barnið: At tað dugir at handfara og fara inn í nýggjar støður, dugir at vera sosialt smidligt, dugir at velja, dugir at bera fram sínar egnu hugsanir, dugir at brúka nýggjar royndir, fær ment tolsemi, javnvirði og andsfrælsi, og harvið dugir at liva í einum broytiligum heimi.

# Pallborðið

## tað søgdu tey við pallborðið...

Tað vóru visiónir um frítíðarskúlan, aldursbólkin 0-18 ár, og visiónir um samstarv millum lærarar og pedagogar, sum vóru høvuðsevnini, teir seks pallborðsluttakararnir skuldu hugleiða og leggja upp til kjak um.

Við pallborðið vóru: Ann-Elisabeth Joensen, leiðari á Frítíðarskúlanum í Hornabø og næstformaður í Føroya Pedagogfelag, Jógvan Philbrow, leiðari á frítíðarskúlanum í Fuglafirði, Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Føroya Pedagogfelag, Johannes Eli Iversen, formaður í Føroya Lærarafelag, Elin Lindenskov, býráðslimur í Tórshavnar Kommunu, Mia Pedersen, varaborgarstjóri í Vestmanna og forkvinna í Føroya Kommunufelag og Heðin Mortensen, formaður í Mentamálanevndini í Tórshavnar Kommunu.

## Greiðari reglur fyri frítíðarskúlar

Ann-Elisabeth Joensen segði, at hóast útvið átta ár eru liðin, síðani skipanin við frítíðarskúlum byrjaði í Havn, verður enn húsast í fyribilsloysnum, sum í flestu førum als ikki eru nøktandi. Hon minti á, at hon og onnur, sum starvast í frítíðarskúlunum, kenna tørvin bæði hjá børnum og foreldrum, og hon vísti somuleiðis á, at í frítíðarskúlunum eru bæði børn við serligum tørvi, børn, sum ikki eru skúlabúgvin, og børn, sum ikki hava eitt sosialt netverk, sum hon tók til.

Ann-Elisabeth Joensen segði, at frítíðarskúlatilboð eiga í minsta lagi at vera til børn í 1. og 2. flokki, og eftir hetta eiga tilboð um eitt nú frítíðarklubbar at standa børnunum í boði. Hon spurdi, hví politikararnir bert tosa um tørvin hjá børnum upp til sjey ára aldur - tey í dagstovnaaldri. Hon vildi fegin hava at vita, hvørjar hugsjónir kommunalpolitikarar hava viðvíkjandi frítíðarskúlum, hvørjar ætlanir Tórshavnar Kommuna hevur, og hví frítíðarskúlarnir ikki verða raðfestir hægri, enn teir í dag verða. Hon undraðist á, at vit ikki hava greiðari reglur fyri frítíðarskúlar.

## Barnaparkering

Hóast frítíðarskúli hevur verið í Fuglafirði í fýra ár, lat Jógvan Philbrow illa at. Talan hevur alla tíðina bert verið um lappaloysnir, sum hann tók til. Nú heldur frítíðarskúlin til í einum sethúsum við so at siga ongum innbúgvi - jú, tvær sofur eru, og pláss skal vera fyri 52 børnum á frítíðarskúlanum. Verandi leigusáttmáli gongur skjótt út, og vit spyrja, hvat so. Her er meira talan um barnaparkering heldur enn at geva børnunum eitt innihald, meðan tey eru á frítíðarskúlanum, segði Jógvan, og spurdi, hvussu tað kann bera til at hava ein frítíðarskúla, um vilji ikki er til at brúka nakað av pengum til ein tílíkan.

## Hugsa ov lítið um innihaldið

Mia Pedersen segði, at tað er rættiliga ymiskt, hvussu er við visiónunum hjá teimum ymisku kommununum, tá tað snýr seg um barnaansing og harvið eisini frítíðarskúlar, men ein sannroynd er, at sera mong ansingarpláss eru komin seinastu árini í fleiri kommunum, hóast allar hesar ymisku loysnirnar ikki eru líka góðar. Mangan tykist tað, sum eitt hús verður funnið meira ella minni í skundi, uttan at hugsað verður nóg mikið um innihaldið, sum gevast skal børnunum. Tað eigur framyvir at hava fremri raðfesting, ikki minst, tá ein hugsar um og er vitni til teir mongu trupulleikar og sosialan tørv, mong børn hava í dag, segði Mia Pedersen.

## Frítíðarskúlatilboð ein sjálvfylgja

Hóast vit neyvan kunnu siga, at vit í øllum førum hava nøktandi ansingartilboð til børn í dag, kunnu vit hóast alt fegnast um tað broytta og nú munandi




***Pallborðsluttakarnir vóru:*** *Ann-Elisabeth Joensen, leiðari á Frítíðarskúlanum í Hornabø og næstformaður í Føroya Pedagogfelag, Jógvan Philbrow, leiðari á frítíðarskúlanum í Fuglafirði, Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Føroya Pedagogfelag, Johannes Eli Iversen, formaður í Føroya Lærarafelag, Elin Lindenskov, býráðslimur í Tórshavnar Kommunu, Mia Pedersen, varaborgarstjóri í Vestmanna og forkvinna í Føroya Kommunufelag og Heðin Mortensen, formaður í Mentamálanevndini í Tórshavnar Kommunu*

meira jaliga hugburðin, flestu hava til barnaansing, segði Elin Lindenskov. Í Havn er barnaansingartørvurin hjá teimum 0-7 ára gomlu loystur, men fyri tey eldru restar enn nógv í. Frítíðarskúlatilboð eru til tey, sum ganga í 1. flokki, men vit eiga at virka fyri, at hetta tilboð eisini verður galdandi fyri tey í 2. og 3. flokki. Harafturat skulu hølisviðurskiftini loysast við at byggja nýggj høli, soleiðis at allur frítíðarskúlin fær tryggar og góðar karmar at virka undir, segði Elin Lindenskov, sum samstundis nýtti høvi til at vísa á tørvin á tilboðum fyri eldri børn og ungdómar. Eitt nú við ungdómshúsum, og hon legði afturat, at treytin fyri góðum og mennandi tilboðum til børn og ung er, at vit hava útbúgvið fólk at skipa fyri.

## Fleiri frítíðarskúlatilboð

Í dag ganga 330 børn í frítíðarskula í Tórshavnar Kommunu, og er hetta nógv fleiri enn roknað varð við, tá kommunan fór undir frítíðarskúlan, segði Heðin Mortensen, sum kundi siga frá, at kommunan hevur ætlanir um at útvega munandi fleiri frítíðarskúlapláss framyvir. M.a. í sambandi við at Hoyvíkar Skúli verður útbygdur, og somuleiðis í sambandi við nýggja skúlan í Hoyvík. Hetta er alneyðugt, tí kommunan fær alsamt fleiri áheitanir frá foreldrum um at útvega fleiri pláss. Somuleiðis er ætlanin at víðka frítíðarskúlatilboðið, fyribils til 2. flokk. Um frítíðarskúlin skal halda til á skúlunum ella í sjálvstøðugum húsum eru ymiskar meiningar um, men skal frítíðarskúlin halda til innan skúlans gátt er neyðugt, at hann fær hølir burturav, segði Heðin Mortensen, sum mælti til at seta ein arbeiðsbólk við umboðum fyri leiðarar á frítíðarskúlunum, skúlar og umsitingina hjá býráðnum.

## Kunnu ivaleyst samstarva meira

Annað av evnunum, sum tey við pallborðið skuldu røða um, var samstarvið millum lærarar og pedagogar - ein gyssari, sum tikið varð til í fundarskránni. Men tað hildu teir báðir, Jarvin Feilberg Hansen og Johannes Eli Iversen, vera nakað nógv sagt. Jarvin segði, at Pedagogfelagið og Lærarafelagið hava samstarv á ávísum økjum, men hetta samstarv kundi ivaleyst verið størri. Uppvøksturin hjá barninum skal fatast sum ein heild, annaðhvørt tað er á dagstovni ella í skúla, og so mugu pedagogar og lærarar samstarva soleiðis, at tað tænir barninum best. Men tá talan er um tveir ymiskar fakbólkar, er ein fyritreyt fyri samstarvi, at tað verður á jøvnum føti, og tað eigur at bera til, segði formaðurin í Pedagogfelagnum.

Johannes Eli Iversen helt góðar møguleikar vera fyri einum neyvari samstarvi millum lærarar og pedagogar, men so mugu eisini greiðar reglur vera um arbeiðsøkið hjá báðum pørtum. Hann vísti á, at frítíðarskúlar eru nýtt hugtak hjá okkum, og enn hava vit onga lóg á økinum. Hinvegin er fólkaskúlin aldargamal, við heilt greiðum lógum og reglum, sum áseta, hvør kann undirvísa í fólkaskúlanum, hvussu undirvísast skal, og hvat næmingarnir skulu læra í lærugreinunum teir ymsu árgangirnar, segði Johannes Eli og helt, at lógirnar fyri frítíðarskúlar eiga at áseta bygnað, so at eitt samstarv millum lærarar og pedagogar kann vera so, at tað gagnar barninum og harvið samfelagnum sum best. Men tað merkir ikki neyðturviliga, at lærarar og pedagogar eru um barnið samstundis. Lyklaorðið fyri samstarvi eru greiðar reglur og virðing hvør fyri øðrum, segði formaðurin í Lærarafelagnum.



*Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Pedagogfelagnum og Johannes Eli Iversen, formaður Lærarafelagsins vóru samdir um, at tað eigur at bera til hjá feløgunum á fleiri økjum.*



*Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin heldur til í ovaru hæddini hjá AUTO. Har hevur skipanin 60 fermatrar at húsast í, men tað er ov lítið, sigur Regin Johansen. Trongligt er hjá starvsfólknum, og mangan koma bæði stuðulsfólk, brúkarar og avvarandi á gátt, so ynskiligt hevði verið við frægari húsarúmd.*

# Brúkarin fær betri tænastu

## - og stuðulsfólkið er tryggari í sínum starvi

***Hetta er í høvuðsheitum tað, sum miðað verður eftir í broytingunum í Stuðulsfólkaskipanini, og leiðarin hevur góðar vónir, at tað fer at eydnast***

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin var í fjør umskipað og flutt frá Almannastovuni til Heimarøktina og Serforsorgina at umsita. Almannastovan hevur verið játtandi og umsitingarligi myndugleikin. Mannagongdin at fáa stuðul frá skipanini hevur verið hon, at søkt hevur verið um at játta løn til eitt stuðulsfólk til ein ávísan persón í eitt ávíst tímatal í eitt ávíst tíðarskeið til eina ávísa uppgávu. Almannastovan hevur so mett um umsókninina og gjørt av, um hjálp frá skipanini hevur verið hóskandi sum loysn á trupulleikanum. Hevur Almannastovan hildið, at stuðul skal latast, var søkt eftir fólki til ávísa brúkaran. Talan hevur verið um ein persónligan stuðul, og hevur tað merkt, at ein stuðul hevur verið til hvønn einstakan brúkara.

Almannastovan skal eftir broyttu skipanini framvegis viðgera umsóknir og koma við tilmæli um stuðul. Hinvegin skal leiðarin av stuðulsfólkaskipanini hava fíggjarliga, fyrisitingarliga og pedagogiska ábyrgd av skipanini.

### Fakligt umhvørvi

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið at broyta stuðulsfólkaskipanina var m.a. sagt, at umstøðurnar hjá starvsfólkunum ivaleyst verða betri í nýggju skipanini, m.a. tí skipanin fær ein leiðara, sum kann menna tað fakliga støðið við at skipa fyri fakligari vegleiðing og hóskandi karmum um skipanina. Á hendan hátt fær starvsfólkið eitt fakligt umhvørvi at virka í, ein møguleiki, sum ikki hevur verið í gomlu skipanini. Sambært somu viðmerkingum var eisini roknað við, at nýggju umstøðurnar kunnu hava eina hepna ávirkan á tann fakliga førleikan hjá teimum, sum velja at søkja starv í stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin. Í viðmerkingunum til lógina varð eisini nomið við fíggjarliga spurningin. Har verður roknað við, at meira kann fást fyri pengarnar, nú lættari verður at samskipa virksemið m.a. soleiðis, at stuðulsfólkini verða stuðlar hjá fleiri enn einum persóni, tá tað er ráðiligt. Um skipað verður fyri felags tiltøkum, sum t.d. svimjing, kan ein stuðul vera til fleiri brúkarar. M.a. hetta verður sagt í viðmerkingunum til lógaruppskotið at broyta stuðulsfólkaskipanina, men hvat sigur nýggi leiðarin av stuðulsfólkaskipanini, Regin Johansen?

### Fegin um broytingina

Regin byrjaði sum konsulentur fyri stuðulsfólkaskipanina og somuleiðis fyri bústaðar- og virkisdeildina í august 2002. Frá 1. apríl í fjør var hann settur leiðari av stuðulsfólkadeildini fyri vaksin, og frá 1. november í fjør leiðari av hesi deild.

Hann er fegin um broytingina, sum fer at bøta um viðurskiftini, bæði hjá brúkarunum og stuðulsfólkunum.

Við gomlu skipanini, at eitt ávíst stuðulsfólk var um ein ávísan brúkara, var sjálvandi stórur vandi fyri, at tann servitan, viðkomandi stuðul hevði ognað sær, fór fyri bakka, tá hesin fór í farloyvi ella segði seg úr starvi.

Hinvegin ber nú til at virka í toymi. Fleiri stuðulsfólk kunnu nú vera um ein brúkara, og við tí fer eisini at bera til at gera eina neyva verkætlan fyri hvønn brúkaran, har orðað verður endamálið við stuðlinum og hvussu

leingi stuðulin skal halda á, og ikki minst verður møguleiki at endurskoða hesa. Regin roknar við, at hetta fer at bøta munandi um viðurskiftini hjá brúkarunum.

### Tryggari í starvi

Fyri stuðulsfólkini eru eisini batar at hóma við nýggju skipanini. Frammanundan kundi eitt stuðulsfólk bert setast í starv fyri eitt ár, men nú í eitt longri tíðarskeið. Hetta gevur størri tryggleika í starvinum. Tað, sum eisini hevur verið at funnist at skipanini, er, at stuðulsfólkini hava kent seg rættiliga einsamøll í sínum virksemi, men nú er ætlanin at skipa eitt fakligt toymi í teimum ymisku landspørtunum. Á henda hátt fer at bera til hjá stuðulsfólkunum at fáa íblástur hvør frá øðrum, og tað hevur sjálvandi eisini við sær eina munabetri hjálp til brúkaran.

### Fleiri fakfólk í skipanini

Brúkarans tørvur ger sjálvandi av, hvørji fakfólk stuðulsfólkaskipanin setur í starv, men ótryggu starvsfólkaumstøðurnar hava verið ein forðing fyri, at tað altíð hevur borið til. Broytingin í skipanini hevur tó ført við sær, at nú eru munandi fleiri fakfólk í skipanini enn áður. Regin Johansen heldur, at arbeiðið í stuðulsfólkaskipanini hevur ikki havt serliga gott orð á sær, men hann heldur, at hesin hugburður er um at verða broyttur. Men tørvurin á fólki við pedagogiskari grundútbúgving er stórur, og sum skilst, so verður hann enn størri.

-Tað er serliga fólkum við pedagogiskari útbúgving, vit hava tørv á. Eg ivist ikki í, at hesi fólk fegin vilja hava góðar og tryggar karmar at arbeiða í, og ikki minst fakligar avbjóðingar. Hesum royna vit eisini at eftirlíka, eitt nú við fleiri skeiðum. Tað, at vit nú eisini fara at skipa okkara arbeiði í fakligum bólkum, fer eisini at stimbra starvsfólkini og harvið eisini gera arbeiðið meira áhugavert, sigur Regin Johansen, sum sigur seg vera sannførdan um, at henda skipan fer at virka munandi betur, enn hon áður hevur gjørt.

### Fleiri brúkarar

Talið á teimum, sum venda sær til stuðulsfólkaskipanina og fáa játtaðan stuðul, økist alsamt. Í fjør vár vóru 45 brúkarar í skipanini, við árslok vóru teir 65, og nú eru 83 aktivir brúkarar í stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin. Regin Johansen sigur, at fíggjarliga játtanin er avmarkað, og at onkuntíð er ein ávísir bíðilisti, men hann roknar kortini við at fáa øllum umsøkjarum hjálp í ár. At talið á brúkarum økist so nógv, er tí, at nú er ikki longur treyt, at ein skal vera pensionistur fyri at koma undir skipanina. Tað, sum nú er avgerandi, er, at umsøkjarin er millum 18 og 66 ár og hevur ein ítøkiligan tørv, sum stuðulsfólkaskipanin kann nøkta.




Innbúgv og leika til stovnar og skúlar



FARODANE

Brekkutún 4
FO 100 Tórshavn
Tel: 31 14 14
www.farodane.fo

# Úr heimi hugans

**Vit standa eina góða løtu við reiðrið, og út kemur ungin úr egginum, har brostið var fyri nev. Bæði vaksin og børn undraðust stórliga; vit vóru hjástødd, meðan tað mest lívsjáttandi hendir. Eitt nýtt lív. Hesa hending verði eg enn mint á av børnunum, sum vóru við; tey eru ikki júst børn longur.**

Ja, so fekk eg í boði at skriva nakrar tankar frá farnari tíð niður til Pedagogblaðið, og vil eg gera mítt til, at hesin teigur verður við á hesum sinni.

Fyri at hetta kann lata seg gera, er neyðugt, at gott fólk og góð tøkni eru tøk sum ein hjálpandi hond; eg siti sjálv suðuri í Sandvík í skrivandi løtu, og eg má fáa hetta rættlisið av góðum fólki, so at lesarin fær ein kjans til at skilja, hvat eg skrivi, og so er eisini ein deadline fyri durum. Nú, tá ið eg skrivi um tøkni og góð vinfólk, kann eg líka so væl byrja mínar hugleiðingar her.

Tá ið eg fyri mongum árum síðani skuldi til tað, sum vit kalla at skriva "spesiali" - ja, ein las á flatlondum - so var evnið "computermagt", og hvat hetta fór at gera við barnamentanina. Hetta helt eg vera sera spennandi evni, og tá ið eg kom til Føroyar, so var hetta fyribrigdið ikki komið heim higar, helt eg. Eg minnist, at niðurstøðan var, at tað var av størsta týdningi, at vit fingu nøktað allar teir "grundleggjandi" tørvirnar hjá børnunum, og at ongantíð áður hevði tað verið meira neyðugt at leiða børnini út í náttúruna. Við hesum í ryggsekkinum fór eg so heim - við tí í huga, at eg skuldi syrgja fyri at gerast ein so góður pedagogur, sum tað yvirhøvur læt seg gera, og eg skuldi eisini syrgja fyri, at børnini, ið eg kom at vera um, skuldu fáa náttúru so tað stóð eftir í. Og ikki at gloyma teir "grundleggjandi" tørvirnar.

Men tað kom at fylla so nógv í tí starvinum, sum eg fekk, tá ið eg kom heim, at tað var ringt, fyri ikki at siga ógjørligt, at ganga í náttúruni.

Eftir at hava roynt meg av í gott ár á Miðstovninum, var longsulin eftir náttúruni so stórur, at eg slepti mær niðan í Hoyvíkshagan at arbeiða.

Vit vóru nærri haganum, og lætt var at sleppa sær út í náttúruna. Men tað var okkurt við, at børn eisini skuldi hava umsorgan og nøktað "grundleggjandi" tørv. Illa gekst at samskipa hagan og umsorganina ("grundleggjandi" tørv); og omaná fóru fólk at tosa um upplivingar og mentan - tað skuldu børnini eisini hava. Og so var tað, at eg bleiv heilt í ørviti; nú var eingin samanhangur millum tað, sum eg vildi geva børnunum, og tað, ið eg helt, bleiv væntað av mær.

Tá var tað, at eg á fyrsta sinni merkti, hvussu neyðugt tað er at hava góð vinfólk, góðar starvsfelagar, gott foreldrasamstarv, at arbeiða undir góðari leiðslu og at duga at lurta væl eftir, hvat børnini vilja hava.

Ráðini komu úr øllum heimsins ættum um, at eg skuldi ganga í meg sjálva, minnast til, hvar eg hevði haft tað best sum barn, og hvat eg treivst best við. Og at eg skuldi gerast góð til eitt ella tvey ting. Ja, so var tað einfalt hjá mær at fáa gjørt meg góða til tvey ting. Tað eina bleiv út í hagan, og hitt bleiv at siga frá søgum.

Tað at ganga í náttúruni er tað mest týðandi fyri meg at geva børnunum lut í. Eitt gamalt orð er, at tað, tú ungur nemur, tú gamal fremur. Og hvat kann vera betri enn at kunna ganga í náttúruni! Nú er tað enntá "in" at ganga í náttúruni fyri at lætna og fyri at fáa frið í sálina.

Fyri meg er tað neyðugt, at barnið fær eina kenslu av bara at vera, at barnið kann kenna friðin, at barnið kann læra, at tað kann liva uttan strongd, og at barnið fatar, hvussu náttúran hongur saman, frá lívi til deyða og aftur til lív o.s.fr.

Tá ið eg arbeiddi uppi í Hoyvíkshaganum, fylgdu vit á hvørjum vári við, hvussu hagafuglurin reiðrast. Ein morgun gjørdi eg av, at um ungin ikki var útkomin, ja so breyt eg tað eina eggið, tí at eggið kundi neyvan verða troðið, um ungin ikki var útkomin. Starvsfólk og foreldur vóru skjót at rokna eftir, um tað var, sum eg segði. Jú, eftir tíðini var tað so. Hendan morgunin regnaði rættiliga illa, men skjótt vóru øll børnini og øll starvsfólkini í regnklæðum, og so til gongu. Eg var eitt sindur bangin fyri, at um ikki ungin var útkomin, so skuldi eg gera nakað, sum eg als ikki brýggi meg um. Tá vit so koma til reiðrið, er annar ungin er útkomin, og á hinum egginum er brostið fyri nev. Og so kunnu tit ímynda tykkum, at frøin var stór. Vit standa eina góða løtu við reiðrið, og út kemur ungin úr egginum, har brostið var fyri nev. Bæði vaksin og børn undraðust stórliga; vit vóru hjástødd, meðan tað mest lívsjáttandi hendir. Eitt nýtt lív. Hesa hending verði eg enn mint á av børnunum, sum vóru við; tey eru ikki júst børn longur.

Tað at siga frá søgum fellur mær eisini lætt, men tað, ið eg haldi verða fantastiskt í hesum er, at børnini lurta, og at tey taka søgurnar til sín, sum um tað veruliga var so. Eg havi ikki tal á, hvussu oftani eg eri spurd, um nú trøll, risar, jólamenn ella vættrar eru til; og eyguni á børnunum bara vísa, at eg má fyri ein hvønn prís halda tey til barnatrúnna, ið er, at tað er so.

Ein morgunin, eg møtti til arbeiðis fyri sløkum 3 árum síðani, kemur ein mamma flennandi í kíki til mín og sigur: "Veitst tú, hvussu pínligt tað kann vera við søgunum hjá tær!"

Eg hugsaði - ja, kanska er tað í so nógv, men fekk í mínum ovfarni spurt, hví hon segði so. Jú, hon hevði saman við dóttrini verði uppi í svimjihylinum ein morgun, og tá ið tær koma inn í matsalin har uppi, og nógv fólk var inni, sigur gentan hart og týðiliga, at hon kendi eina konu, ið bert átti tvey pør av undirbuksum. Mamman rodnaði og helt, at dóttirin fór at tosa um seg, og fyri at bjarga sær sjálvari í land spyr hon: "Hvat tosar tú um?" "Jú,"



svarar dóttirin, "Asta, hon átti eitt trøll, og ein morgun fann Asta ikki hinar undirbuksurnar, tí at trøllið hevði latið seg í tær upp á høvdið sum húgvu." Og so hevði gentan í sínum einfaldni roknað út, at eg var í einum, og so vóru tað hinar; tað gav tvinnar undirbuksur. Læt tað vera ósagt, hvussu nógvar undirbuksur vóru.

Tað kann blíva nakað ógvusligt fyri nøkur børn at hoyra um, at høvdini rulla, og at eitt skeldarí kann gera, at tvey vaksin skulu skiljast. Tað kann verða í so hart sjálvt fyri tann skrapp-asta drongin.

Einaferð beint eftir, at vit vóru byrjað við hagabarnagarðinum í Havnardali, so kemur ein mamma til mín og sigur, at hon skilir einki av, at sonur hennara nærum ikki tordi inn í kamarið at sova um kvøldið. Hon tosar um, at sonurin er bangin fyri, at hon og pápin skulu skiljast. Eg undrist eisini eitt sindur, men so sigur eitt av starvsfólkunum: "Ja, men Asta, fyri sløkum mánaði síðani fortaldi tú søguna um Jólastjørnuna." Ups, nú visti eg beinanvegin; drongurin hevði sitið við opnum tyggjandi munni og lurta. Eg mintist, at hann var so upptikin, at hann fekk ikki svølgt millummálan, tí hann gloypti hvørjum orði, ið eg segði.

Fyri at fáa mammuna og sonin rólig aftur, so gjørdi eg av at fortelja eina líknandi søgu, hvar mamma og pápin als ikki skiltust. Síðani hesa hending havi eg fortalt jólastjørnuna soleiðis, at alt endar væl.

Fyri meg er tað av størsta týdningi at kunna geva børnum góðar upplivingar, góðar læru- møguleikar og tryggar umstøður, so at tey kunnu fáa so góðar vakstrartreytir, sum til ber. "Tað er ikki nóg gott bara at tíma at ganga í náttúruni," segði mín kæri starvsfelagi á sinni. Eg undraðist á hetta, og eftir nærri boðum fekk eg at vita, at tað var neyðugt at duga at læra hetta frá sær; og tað hevði eg ikki júst hugsað um. Tað eru treytir, ið fylgja við, tá ið vit ganga í náttúruni. Sumt er friðað, annað er innigyrt, vandar eru á vegnum, vøkstur o.s.fr. Einaferð var eg saman við einum starvsfelaga í viðarlundini, og dunnurnar reiðraðust. Fyri at vísa børnunum, hvat tað var fyri nakað, fóru vit út á hólmin. Nógv ár eftir hetta bar tað so á, at eg var saman við einum starvsfelaga, ið var uppvaksin í Havn, og dunnurnar reiðrast aftur. Eg ætlaði, at vit skuldu vísa børnunum hetta. Tá sær hon skelkað út og sigur mær, at hólmurin er friðaður. Og eg lovi tykkum, at hólmurin hevur fingið frið fyri mær síðani.

Ja, so skjótt kann tað vera at bróta tær treytir, ið sjálvandi skulu vera, um ein ikki hugsar seg um.

Hóast eg ikki haldi, at tað altíð hevur verið so gott í teimum gomlu tíðunum, so var nógv gott, og tað haldi eg, at vit skulu halda fast við.

Menningin útihýsir ikki fortíðina. Í farnari tíð gjørdu vit royndir okkara; summar vóru super góðar, og aðrar vóru minni góðar. Eg vildi so fegin, at vit halda fast við tær góðu royndirnar og brúka tær minnu góðu til at stíga meira vitandi inn í framtíðina við. Og tí vil eg gera orðini hjá starvsfelaga mínum til míni: "Tað er ikki nokk bert at tíma".

Fyri einum 15 árum síðani las ella hoyrdi eg eina gamla konu í sjónvarpinum - eg minnist ikki, hvaðani eg havi hetta - og tað, ið var sagt frá hesi gomlu konu, ið búði í einum menningarlandi, var, at um tú ætlar tær at liva lívið, also veruliga vera í útviklingi og merkja, hvat ríkidømi lívið hevur, so skalt tú vera saman við børnum meira enn helvtina av degnum. Hetta hevur nokk sett spor í minni mítt, tí hvørja ferð, eg havi havt ein dag, har eg ikki havi verið saman við børnum, so kennist dagurin so nógv øðrvísi.

So eg haldi fram sum leiðari á Miðstovninum, Túgvuni og á útistovuni á Hvítanesi.

Áðrenn eg fari at senda henda drunn víðari, fari eg at nýta høvi til at takka fyri, at Hannebeth sendi hann til mín, so eg fái takka øllum teimum starvsfeløgum, ið eg havi verið saman við ígjøgnum árini. Tit skulu vita, at tit hava verið til stóran stuðul og ríkan lærdóm. Og tit, sum eg havi verið leiðari hjá, tit hava øll verið ein fantastisk arbeiðskraft; uttan tykkum fekk eg ikki hugsjónir mínar við útibarnagarðinum settar í verk, og eg hevði als ikki kunnað gjøgnumført tað arbeiðið, ið eg veruliga brenni fyri sum leiðari.

Eg sendi drunnin víðari til Nicolinu Skaalum

Takk fyri at tú tekur henda drunn Nicolina.

Vinarliga
*Asta Hjelm*



Tær veva

# Ein mennandi og spennandi námsferð í Aberdeen

***-sum vit ivaleyst hava nakað at læra av, skrivar Maud Wang Hansen í ferðafrásøgn síni***



Tey nýta nógvar litir í vevnaðinum



Beannachar

Starvsfólk á Verkstaðnum Vón fóru tann 20. mai 2004 ein túr til Aberdeen.

Áðrenn fráferðina lá eitt stórt arbeiði í at fyriskipa ferðina sum eina námsferð. Tað, vit løgdu okkum eftir, var at vitja støð, har fólk við menningartarni vóru, antin á skúlum ella arbeiðsplássum.

Vit høvdu hoyrt um eitt stað nærhendis Aberdeen, har tey løgdu sítt virksemi tilrættis samsvarandi hugsanunum hjá Rudolf Steiner. Hetta staðið hevur fyrr verið vitjað av fólkið frá Serstovnadeildini.

Gjøgnum samskifti við Sofus Poulsen, fyrrverandi umboðsmann, fingu vit gjørt eina skrá fyri, hvørji støð vit kundu vitja.

Sofus var sera hjálpsamur og fekk skjótt samband við fólk, sum fegin vildu vísa okkum runt á sínum arbeiðsplássum. Vit vitjaðu trý ymisk støð, ið øll arbeiddu út frá grundarlagnum hjá Rudolf Steiner.

Okkara ynski var at fáa íblástur til nýggja framleiðslu, umframt at síggja aðrar arbeiðshættir.

Vit fingu sendandi tilfar frá teimum ymisku støðunum um teirra virksemi og um teirra ástøðiliga grundarlag fyri arbeiðnum við mennigartarnaðum.

Vit hugdu at video og lósu ymiskt tilfar á enskum og royndu at seta okkum gjølla inn í hetta fyri at vera so væl fyrireikað sum gjørligt, áðrenn vit komu at vitja.

Um ein hevur hug at seta seg inn í, hvat Rudolf Steiner stendur fyri, so eru møguleikar fyri hesum gjøgnum bókasøvnini.

Komin til Aberdeen gistu vit á Skeenhouse Rosemount, eitt hotel við íbúðum. Har vóru fleiri aðrir føroyingar eisini, so vit kendu okkum ikki heilt fremmand. Vit vóru sera væl móttikin, og fyri okkum stóð Sofus Poulsen; hann sá út sum ein rættur skoti.

### Skúli og arbeiðspláss

Tann fyrsta vitjanin var á einum stað, Beannachar, har ung vaksin búðu og arbeiddu. Hetta var bæði ein skúli og eitt arbeiðspláss, har tey ungu kundu fyrireika seg til vaksnamannlívið og læra ymiskt handverk umframt at dyrka jørðina og brúka ymisku grøðina til framleiðslu og sølu. Alt gekk fyri seg á vistfrøðiligan/biodynamiskan hátt og við virðing fyri náttúruni og menniskjuni.

Har var veviverkstaður, har tríggir - fýra næmingar lærdu at veva ymiskar lutir. Tógvið, tey nýttu, var plantulitað, og næmingarnir lærdu sum fráleið sjálvir at gera mynstur og at avgera, hvat teir vildu veva. Tað var sera áhugavert at hoyra pedagogin/læraran/hjálparan greiða frá, hvussu hon lærdi frá sær, og hvussu hon fyriskipaði læringina/arbeiðið. Alt var lagt til rættis sum eitt slag av terapi, har kroppurin, allir sansirnir og sálarliga støðan hjá persóninum var tikin við.

Staðið var bygt upp eftir einari holistiskari menniskjaáskoðan, har tað heila menniskja, umhvørvið og universið eru miðdepil í arbeiðnum.

Á Beannachar var eisini ein timburverkstaður. Ein pedagoglesandi hevði saman við næmingunum bygt eina

*Ein pedagoglesandi hevði saman við næmingunum bygt eina kano úr límtræ*



kano úr límtræ, hetta var hansara verkætlan í sambandi við próvtøkuna á universitetinum.

Uttanfyri høvdu tey sett ein trædreyibonk upp; hann var gjørdur við hond og var rikin við beinkraft; tað var stuttligt at sleppa at royna seg á hesum tólinum. Vit vóru nokk sannførd um, at júst hesin arbeiðshátturin ikki hevði givið Vón nakra serliga inntøku. Men vit hava ymisk endamál fyri okkara virksemi, og á Beannachar var endamálið, at næmingurin skuldi sleppa at royna seg á ymiskan hátt, meira enn bara at framleiða eina ávísa vøru.

Tey høvdu ein stóran urtagarð og nøkur drívhús, har tey framleiddu grønmeti og ymiskar urtir, sum tey turkaðu og brúktu í framleiðsluni av te, oljum og kremi.

Staðið var sera áhugavert at vitja, og øll vóru blíð og týð. Vit fingu ein drekkamunn av urtatei og heimabakað breyð afturvið.

## Camphill School, Murtle Estate

Tað næsta staðið, vit vitjaðu, var ein av The Camphill Schools, á Murtle Estate. Hetta er ein skúli fyri børn við serligum tørvi. Nógv teirra hava autismu og eru eisini menningartarnað, og fleiri eru har vegna stórar sosialar trupulleikar ella brek.

Susie vísti okkum runt á staðnum og greiddi okkum frá arbeiðnum har og frá ástøðiligu bakgrundini hjá Rudolf Steiner. Hon greiddi m.a. frá, at skúlin byggir á eitt kristið grundarlag. Flestu børnini vóru upptikin, tá vit komu á skúlan, tey vóru til gudstænastu í kirkjuni á staðnum. Bygningarnir og litirnir í rúmunum vóru serligir, og arkitekturin livdi upp til tey sjónarmið, sum lógu aftan fyri tað terapeutiska arbeiðið, sum bleiv framt á Camphill School.

Vit vóru inni og vitjaðu eitt flokshøli, har ein næmingur var inni saman við einum lærara. Næmingarnir vóru býttir upp eftir aldri, tí man meinti, at uttan mun til, hvussu barnið er fyri í menning, kann tað læra okkurt. Tey, sum høvdu serliga nógvan tørv á hjálp, fingu hesa hjálpina, t.v.s. at man normeraði eftir tørvi, so undirvísingin hóskaði til menningina hjá barninum, heldur enn at barnið skuldi laga seg eftir einum ávísum normi ella bygnaði.

Á skúlanum fór ein partur av undirvísingini fram á einum verkstaði, har tey framleiddu ymiskar lutir, sum vórðu seldir. M.a. stoyptu tey ljós í ávísum litum, tey litaðu pappír, sum bleiv gjørt til brævpappír og mappur, og tey tøvdu ymiskar smálutir, alt í ælabogalitum.

Terapiin lá í, at tey arbeiddu við tónleiki, orðum, litum og planetum, meðan tey framleiddu ymisku smálutirnar. Har var ein ávísur religiøsur dámur yvir arbeiðnum, og man kundi keypa sær ymiskar lutir at samla positivar tankar og energiir við.

Vit vitjaðu eitt av heimunum, sum børnini búðu í. Har var hugnaligt inni við eini felagsstovu við brenniovni og einum køki. Uppiá høvdu børnini hvør sítt kamar og búðu sostatt á skúlanum. Har var hvørki sjónvarp ella radio í húsinum og eingir skreytlutir. Borðreitt var til døgurða, og ein vegetariskur rættur var í gerð í køkinum. Aftur her var menniskjan í miðdeplinum, og pedagogarnir/lærararnir/hjálpararnir løgdu stóran dent á tað sosiala, á samtaluna og á at veita umsorgan fyri børnunum.

Vit møttu einum gomlum donskum jøda, sum hevði búð í Camphill síðan seinast í 30´num. Hann var flýddur undan krígnum og hevði arbeitt á Camphill Schools í øll árini. Nú var hann gamal og búði í einum lítlum, hugnaligum húsi á økinum rundan um skúlan.

## Newton Dee Village

Triðja staðið, vit vitjaðu, var tað størsta og seinasta staðið, vit náddu á hesum sinni.

Newton Dee Village er ein heil bygd, sum liggur úti í einum stórum skógi. Har búgva umleið 200 fólk, 120 av

Framhald á síðu 21



*Vakstrarhúsið*



*Urtir verða turkaðar*





*Newton Dee Village*



***Umboð fyri lærarar og pedagogar.*** *Frá vinstru: Martin Eidesgaard, Páll Poulsen, Gitta av Kák, Johannes Eli Iversen, Tórfinn Højgaard, Esmar Berg, Elsa Birgitta Petersen og Ann Elisabeth Joensen.*

# Læra at virka í einum sosialum felagsskapi

***At børnini fáa eina góða undirvísing í grundleggjandi lærugreinum er ein sjálvfylgja, men tað hevur ikki minni at siga, at børn og ung eisini læra at virka í einum sosialum felagsskapi, har tær kreativu lærugreinirnar verða raðfestar høgt, siga Ann Elisabeth Joensen og Gitta av Kák, pedagogar og nevndarlimir í Pedagogfelagnum***

Norðurlond siga seg, og vilja fegin, byggja á fólkaræðisliga grund. Ikki bert tá ræður um val til ting ella kommunur, men eisini at fremja fólkaræði í verki út í odd og egg. Harafturat vilja hesi lond eisini seta menniskjansligu eginleikarnar høgt. Men er hetta so í gerandisdegnum, millum annað í uppalingar- og undirvísingarhøpi?

Júst hesir spurningar vórðu tiknir upp á einum skeiði, sum NLS - norðurlendskur felagsskapur fyri lærarar og pedagogar - tók upp á eini ráðstevnu herfyri, har eisini umboð fyri pedagogar og lærarar úr Føroyum luttóku. Høvuðsevnið var  Etikkur í fakfelagsarbeiðinum , og nomið var við mangar spurningar í tí sambandi. M.a. um virðisgrundarlagið hjá pedagogum og lærarum, um rasismu og um happing.

Eitt sera viðkomandi evni, halda tær báður, Ann Elisabeth Joensen og Gitta av Kák, sum bera ótta fyri rákinum, at pedagogiska arbeiðið gerst alt meira tekniskt.

Menniskjanslig virði fyri vanbýti
-Alt verður nú meira reglubundið. Børn og ung skulu læra tað og tað, og lítið og einki pláss er fyri sonnum grundleggjandi fólkaræðisligum og menniskjansligum virðum. Alt snýr seg um eitt pensum, innlæring. Vit gerast alt meira skúlafokuserað heldur enn at hugsa um heildina í barninum, siga tær báðar og spyrja, um alt skal snúgva seg um at vera við í einum fakligum dugnaskapsmeldri, heldur enn eisini at venja uppvaksandi ættarliðið at liva og virka saman við øðrum í fólkaræðisligum høpi.

Og tað er júst her tær halda, at pedagogarnir eiga at koma meira inn í myndina. Ikki fyri at troka seg inn á virkisøkið hjá lærarunum, men heldur at virka saman við teimum eftir greitt avtalaðum arbeiðsuppgávum.

-Sjálvandi eiga lærararnir at taka sær av undirvísingarliga partinum, og so kundu pedagogarnir tikið sær av teimum meira bleytu virðunum, felagsskapinum. Teimum kreativu lærugreinunum, ikki minst gjøgnum spæl. Viðhvørt hava vit lyndi at vevja alt saman, so tað gerst stríðsmál, hvat uppgáva lærarans er, og hvat pedagogarnir skulu taka sær av. Men tað er ikki neyðugt. Greiður skilnaður kann og skal gerast, viðvíkjandi hvørja uppgávu hvør hevur, siga Ann Elisabeth og Gitta. Í Danmark eru tey komin so mikið langt í so máta, at har hava pedagogar ávísar uppgávur upp í triðja flokk í fólkaskúlanum. Tær halda, at tað hevur stóran týdning, at umboð fyri bæði lærarar og pedagogar eru saman á einum tílíkum skeiði. Tað ger sítt til, at hesir báðir fakbólkar betur skilja hvønn annan, og tað kann aftur stimbra undir eitt tættari samstarv. Tær halda eisini, at tað hevur stóran týdning, at fakfeløgini eru við at orða virðirgrundarlagið fyri hesum arbeiði, og at gera limirnar sannførdar um tey grundleggjandi virðini, sum her er talan um.

### Bert tá trupulleikar eru

-Sum er, koma pedagogar ikki inn í myndina, fyrr enn veruligir trupulleikar stinga seg upp. Tá søkt verður eftir einum stuðli, er boð eftir okkum. Tá er okkara uppgáva at hjálpa tí einstaka barninum sum hevur einhvørjar trupulleikar. Umframt tað, halda vit tað hevði verið skilagott, at pedagogar vóru ein natúrligur partur av

skúlanum - undirvísingini - soleiðis at vit kundu gjørt okkara til at læra børnini at samvirka sosialt í einum samlaðum høpi. Her halda við, at vit hava nakað at læra av okkara norðurlendsku grannatjóðum, siga Ann Elisabeth og Gitta.

### Vit kunnu eisini siga øðrum nakað

Hvør at læra av øðrum er eitt av høvuðsendamálunum við fleirtjóða felagsskapum, og so er eisini við NLS, sum eisini hevur samband við líknandi felagsskapir uttan fyri Norðurlond. Í NLS eru tey nú farin undir at fyrireika ein bókling, sum er ætlaður tílíkum felagsskapum í EF-londunum. Bóklingurin skal m.a. snúgva seg um teir karmar, barnaansing og skúli virka í. Í fleiri londum í Evropa hava tey skipað tilveruna hjá børnum og ungum, líka frá vøggustovu og langt upp í skúlaaldur, í somu fysisku karmar við eini ógvuliga neyvt settari dagsskrá. At børnini ikki uppliva annað enn hetta sama umhvørvi í so mong ár, halda mong vera sera óheppið, og tey royna tí at finna aðrar loysnir. Ann Elisabeth og Gitta skulu eisini geva bóklinginum sítt íkast, sum tær halda, at onnur kunnu taka til sín og læra nakað av. Tær vísa á, hvussu grundleggjandi tað er í gerandisdegnum, at børnini eru úti í nattúruni, og tað gera flestu stovnar í Føroyum nógv av. Ann Elisabeth og Gitta halda, at hóast náttúrugivnu møguleikarnir ikki eru eins góðir nógva aðrastaðni, so kunnu onnur ivaleyst taka nakað til sín av tí, sum føroyskir stovnar hava at bjóða sínum børnum.

# ”Supervisión var ein partur av arbeiðinum, tað var lagt inn í skemaið..”

*sigur Ingilín Berg*



*Ingilín saman við børnunum Brandi og Sissa*

Ingilín Berg starvast sum pedagogur í barnagarðinum á stovninum við Velbastaðvegin í Tórshavn. Har hevur hon verið síðani 1999.

Ingilín hevur tikið sína útbúgving í Danmark. Áðrenn hon kom til Føroya, arbeiddi hon 4 ár í eini verkætlan fyri mammur og børn, sum vóru flóttafólk ella innflytarar, og sum ikki dugdu danskt. Mammurnar gingu í skúla, og ímeðan vóru børnini ansað á dagstovninum, har Ingilín arbeiddi. Ein av uppgávunum hjá Ingilín og starvsfeløgum hennara var at læra mammurnar, hvussu man í Danmark ansar børnum, og hvørjar møguleikar børn í Danmark hava.

### Starvsfólkasupervisión

Árið fyri, sum Ingilín flutti til Føroya, gjørdi leiðslan á stovninum av, at stovnurin skuldi fara í holt við starvsfólkasupervisión. Øll starvsfólkini vóru á skeið, og á skeiðnum fingu øll eina upplæring í at supervisera og at verða superviserað. Tey fingu eisini eina uppskrift .

Starvsfólkini vóru býtt í tveir bólkar, 6 starvsfólk í hvørjum bólki. Í bólkunum vóru bæði pedagogar og hjálparfólk, og øll vóru javnstillað.

### Royndirnar hjá Ingilín hava verið sera positivar

Ingilín greiðir frá, at tey høvdu supervisión fast triðju hvørja viku, í 2 tímar. Tey seks í bólkinum skiftust um at supervisera, og hvørja ferð vóru tvey, sum skuldu superviserast (supervisantar), ein tíma hvør. Hesi tvey skuldu skriva eitt sindur um, hvat tey ætlaðu at tosa um og geva tí, sum skuldi supervisera. Uppgávan hjá supervisor var at lurta aktivt og at seta spurningar. Tvs. spyrja inn til tað, hon/hann hevði hoyrt og eygleitt.

### Stovufundir ella starvsfólkafundir kunnu ikki samanberast við supervisión

Á stovninum, har Ingilín í dag arbeiðir, hava tey ikki supervisión. Tey hava tó møguleika at biðja um supervisión, men tá er tað gjarna nøkur størri mál sum verða tikin upp. Tey hava ikki tosað um, hvørt tey skulu innføra supervisión. Sum á øðrum stovnum hava tey tó stovu- og starvsfólkafundir, men hetta kann ikki samanberast við supervisión, heldur Ingilín. Supervisiónin hevur ein serligan framferðarhátt, sum vanligir stovu- og starvsfólkafundir ikki hava. Á teimum fundunum hevur tú eisini so nógv mál á skránni, at sjáldan er møguleiki at fara í dýpdina við einum einstøkum máli.

Ingilín sigur, at supervisión er ein væl virkandi framferðarháttur at skilja millum, hvør tín uppgáva er í einum máli, og hvat onnur eiga at taka sær av.

At enda slær Ingilín fast, at orsøkin til, at hennara royndir við supervisión eru so góðar, er helst, at leiðslan á stovninum raðfesti hetta høgt, og harafturat vóru tað starvsfelagar í bólkinum, sum eisini raðfestu tað og løgdu lag á.

# ”Supervisión er alneyðug...”

*- sigur Helle Fehmerling*



**Helle Fehmerling er onnur av tveimum undirvísarum í grundútbúgvingini í Supervisión, sum fer av bakkastokki í november 2004, um nóg nógv hava teknað seg innan 14. oktober 2004. Tað er Synergi, sum skipar fyri grundútbúgvingini saman við Den Sociale Højskole (DSH) í Keypmannahavn. Tað er sama útbúgving, sum DSH skipar fyri, og luttakararnir fáa sostatt prógv frá DSH.**

Helle er útbúgvin sosialráðgevi, útbúgvingarkonsulentur og supervisor. Hon hevur arbeitt sum supervisor í 15 ár í amtum og kommunum í Danmark. Ikki óvæntað heldur hon, at supervisión er ein sera týdningarmikil partur av arbeiðinum hjá eitt nú pedagogum, sjúkrarøktarfrøðingum og sosialráðgevum - ja, øllum, sum arbeiða við menniskjum.

Hetta eru størv, sum krevja nógv av starvsfólkunum. Vit geva alla tíðina nógv av okkum sjálvum og hava kanska lyndi til at súgva tær torføru sakirnar at okkum og blanda okkara privatlív við arbeiðslívið. Júst hesi lag verða skild sundur í supervisión, soleiðis at tú kanst greina sundur privatlív og arbeiðslív, sigur Helle Fehmerling.

### Hvat er supervisión?

Supervisión er ein framferðarháttur, sum verður brúktur á teimum pedagogisku og sosialu økjunum. Harafturat eisini á heilsuøkinum. Gjøgnum supervisión fær tann, sum hevur ein fakligan trupulleika, møguleika at koma inn í kjarnuna í trupulleikanum. Nýggj perspektiv og sjónarmið verða inndrigin, og ein menning/broyting av arbeiðsinnsatsinum kann byrja.

Í supervisión arbeiða vit út frá einum skipaðum leisti, har vit fyrst lýsa trupulleikan, avmarka hann og gera eina nágreiniliga lýsing og meting, áðrenn vit seta tiltøk í verk, sigur Helle Fehmerling. Tað er somuleiðis eisini týdningarmikið at eftirmeta.

Framferðarhátturin er í veruleikanum grundleggjandi fyri alt pedagogiskt, sosialt og heilsufrøðiligt arbeiði. Arbeiðspress, skerjingar og bygnaðarviðurskifti á arbeiðsplássinum kunnu gera, at tað kann verða torført at varveita ta fakligu heildarmyndina og yvirlitið. Supervisión er vorðið viðurkent, supervisión tryggjar, at tann fakligi og persónligi førleikin kann útviklast.

### Hví er supervisión ikki algongd?

Ein tann største forðingin fyri, at eitt nú stovnar ikki seta supervisión í verk, er kanska vantandi útbúgving og royndir á økinum. Men eisini vantandi orka er ein trupulleiki. Vit hava spurt Helle Fehmerling, hvussu nógva tíð ein leiðari skal rokna við at brúka um mánaðin, um hon/hann ynskir at seta í verk supervisión á arbeiðsplássinum. Hon heldur, at undir vanligum umstøðum eru 2 tímar um mánaðin nóg mikið.

Tað, sum er týdningarmikið, er, at leiðarin ger eina avtalu við starvsfólkini um, nær og hvar supervisiónin fer fram. Tað er sostatt týdningarmikið, at supervisión fer fram eftir einum skipaðum leisti. Starvsfólk, ið hava ymiskar upplivingar, sum tey ynskja at tosa um, kunnu tá skúgva hesar til viks, væl vitandi, at á komandi supervisiónsfundi kann evnið verða tikið upp.

### Supervisión í bólkum fært tú meira burturúr, heldur Helle Fehmerling

Helle velur supervisión í bólkum ella starvsfelagasupervisión framum. Hon heldur, at tú fært meira burturúr, m.a. tí at tú kennir trupulleikarnar hjá hinum aftur og kanst identifisera teg við teir. Hetta heldur hon hava sera stóran týdning. Undir vanligum umstøðum er nóg mikið við 2 tímum um mánaðin - eisini til bólkasupervisión.

### Leiðslusupervisión - ein serligur problematikkur

Supervisión kann gevast av leiðara, starvsfelaga ella einum eksternum supervisori. Helle greiðir frá, at leiðslusupervisión hevur ein serligan problematikk, sum saman við hinum formunum verður gjøgnumgingin á útbúgvingini. Um ein starvsfelagi hevur fingið undirvísing í supervisión, kann supervisión setast í verk á einari deild innan fyri eitt ár. Hon mælir tó til, at ein eksternur supervisor fylgir gongdini í fyrstuni, t.d. eina ferð hvørt fjóðringsár. Eisini metir hon, at starvsfelagar, sum skulu taka ímóti supervisión, eiga at fáa eitt sindur av undirvísing í hesum hátti at arbeiða.

### Ein kanning átti at verið sett í verk

Vit vita ikki, hvussu vanlig supervisión er í Føroyum, men vit hava varhugan av, at tað ikki er nógv brúkt. Áhugavert hevði verið at gjørt eina kanning. Helle greiðir frá, at í Danmark verður ekstern supervisión nógva staðni løgd inn í fíggjarætlanina, umframt ta vanligu skeiðsfíggjarætlanina. Supervisión verður flestu staðni roknað sum ein fastur og neyðugur partur av m.a. fakligu og persónligu menningini.



*Tiltakið endaði við, at børnini savnaðust á Vaglinum, har tey sungu og trinu føroyskan dans.*

Verkætlanin fyri tey 6-7 ára gomlu børnini í Tórshavnar Kommunu, sum varð fyriskipað í vár, eydnaðist sera væl. Helena Fríðheim, sum stóð fyri fyrireikingunum, letur væl at.

-Tiltakið, ella rættari sagt tiltøkini, eydnaðust til fullnar, og var hetta sjálvandi takkað verið øllum teimum, sum vóru við í tiltakinum og stuðlaðu tí, sigur Helena.

Verkætlanin fevndi um øll tey 320 børnini í seks og sjey ára aldrinum, sum eru í Tórshavnar Kommunu. Arbeiðsheitið varð var Hagin og várið , og sum heitið bar boð um, var eisini ætlanin, at børnini skuldu fáa eina uppliving í náttúruni, fyri síðani at fáa møguleika at royna síni skapandi evni á ymiskum verkstøðum í Havn, - í Sjónleikarhúsinum, Skansastovu, Listaskálanum, Hornahúsunum og í Losjuni. Og tað fingu tey so sanniliga eisini høvi til.

Undan tiltakinum segði fyriskiparin við Pedagogblaðið, at tiltakið skuldi gera sítt til at staðfesta, um grundarlag er fyri at fáa eitt smábarnamentanarhús sett á stovn í Havn.

Tað er Helena Fríðheim í dag ikki í iva um, at grundarlag er fyri.

-At grundarlag var fyri einum tílíkum smábarnamentanarhúsi í Havn høvdu vit avgjørt varhugan av, men eftir hetta tiltakið ivast vit als ikki. Tað hevði rætt og slætt verið eitt sera gott hugskot. Vit ímynda okkum eitt hús sum ein karm um eina smábarnamentan, sum kann kveikjast og mennast á ein havnar-føroyskan hátt, sum Helena tekur til, og har børnini sjálvi kenna seg aftur, stuðlað av yrkislærdum fólkum. Helena heldur, at eitt tílíkt hús eigur at verða sett á stovn í Havn.





# SIRKUS á dagstovni

Eftir dúgliga at hava vant meginpartin av vetrinum, kundu børnini á einari stova á Býlíngshúsinum á Norðasta Horni, beint undan summarfrítíðini, sýna fram síni sirkus-kynstir fyri vinfólkum sínum á hinum stovunum. Og tað var ikki eiti á. Hugflogið væntaði ikki. Við sonnum sirkustónleiki afturvið, trinu fram á pallin klovnar, línudansarar, gandakallar, akrobatar, onkur sterkur maður, sum kundi lyfta tað mest ótrúliga, onkur bleiv sagaður sundur, men kom tó heilskaptur frá tí kortini, og mong onnur. Og sum tað sjálvandi eisini eigur at vera í einum veruligum sirkus, komu eisini dýrini fram á pallin. Ei undur í, at har var bæði fagnaður og lógvabrestur av teirri fjøld av børnum, sum vóru komin í sirkus-Norðasta Horn hendan dagin.









Dagstovnurin í Hósvík

# Alt ov fáir pedagogar

Dagstovnarnir økjast alsamt í tali, bæði í høvuðsstaðarøkinum og uttanfyri, og við hesum veksur ikki minni tørvurin á pedagogum, sum í dag eru alt ov fáir í mun til tað, lógin setur sum minstamark. Bert eftir teimum seinastu trimum árunum eru ikki færri enn sjey nýggir stovnar komnir innan fyri kommunumarkið hjá høvuðsstaðarkommununi, og harafturat eru nakrir komnir kring landið. Aðrir stovnar standa í gerð. Hetta ger sjálvandi tað, at bíðirøðirnar eftir einum dagstovnaplássi eru tódnaðar munandi, og onkustaðni eru heilt burturi, men medaljan hevur eisini eina rangu. Á ranguni á hesi somu medalju stendur spurningurin: Hvør skal vera um børnini á stovninum. Lógin sigur eitt, meðan veruleikin er ein heilt annar.

Lógin ásetur, at stovnarnir skulu í minsta lagi verða mannaðir við tveimum triðingum av pedagogum, og í mesta lagi einum triðingi av hjálparfólkum. Ikki er nóg mikið av pedagogum í landinum, og tí er býtið millum pedagogar og hjálparfólk øðrvísi enn tað, sum ynskiligt og lógligt er.

Í Havn var støðan í vár, at samanlagt virkaðu 318 ársverk innan dagstovnaøkið. Av røttum skuldu har verið 212 pedagogar, men har vóru bert 141. Við øðrum orðum var tørvur á 71 pedagogum tá, og støðan er ikki vorðin frægari síðani.

Men hetta er ikki allur tørvurin. Uttan fyri Havnini er eisini tørvur á pedagogum. Harafturat ger hesin tørvur seg ikki bert galdandi á dagstovnaøkinum.

Regin Johansen, leiðari á stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin, fegnast í samrøðu aðrastaðni í blaðnum um, at áhugin hjá fakfólki at søkja starv innan stuðulsfólkaskipanina er øktur, men hann má hinvegin ásanna, at sera trupult er at fáa nóg mikið av fólki við pedagogiskari útbúgving.



▲ Dagstovnurin á Oyrabakka

# Størri krøv til innihald

*Margrethe Brun Hansen og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum, høvdu nógv at práta saman um.*
***Mynd: Jens Kr. Vang***



Tær fýra, Poula Eidesgaard, Turið Horn, Maibritt Simonsen og Jórun Niclasen, sum herfyri skipaðu fyri ráðstevnu um trivnaðin hjá børnum á dagstovni, vónaðu og roknaðu við 200 luttakarunum, men tá avtornaði, gjørdist ráðstevnan fullteknað við 400 luttakarum, og fleiri enn 200 sluppu ikki inn vegna plásstrot.

At dagstovnarnir standa fyri stórum broytingum og avbjóðingum er lítið at ivast í, nú fysisku karmarnir eru um at verða nøktaðir. Foreldur seta nú størri krøv til innihaldið á stovninum, og tað halda fyrireikararnir av ráðstevnuni ikki vera annað enn rætt og rímiligt.

Tær halda, at samstarvið og samskiftið millum foreldur og stovn hava sera stóran týdning fyri, at børnini fáa so góðar upplivingar og trívast so væl á stovninum sum gjørligt. Millum fyrilestrahaldararnar vóru Erik Sigsgaard og Margrethe Brun Hansen, sum eru barnaserfrøðingar, rithøvundar og nógv bílagdir fyrilestrahaldarar, sum viðgjørdu mangt og hvat, sum hendir í gerandisdegnum á einum stovni. Fyrireikararnir fegnast um stóra áhugan og ikki minni um, at luttakararnir siga seg hava fingið nogv burtur úr hesum báðum døgunum, ráðstevnan var.

## Eitt sjónarmið

Las í seinasta Pedagogblað, at ráðstevna skal vera um trivnaðin hjá børnum á stovnum, og einki er at ivast í, at tørvur er á tílíkari ráðstevnu. Okkum tørvar meira vitan um trivnað hjá føroyskum børnum á føroyskum stovnum.

Tað eru áhugaverdir fyrilestrarhaldarar, ið eru bodnir higar. Erik Sigsgaard hevur skrivað spennandi bøkur og granskað børn og trivnað. Margrethe Bruun er uttan iva ein, ið eg kundi hugsað mær at hoyrt, men so kemur mítt men… Hvar eru pedagogarnir? Okkara egnu royndir? Og egnu hugsjónir? Hví lata vit ikki ein føroyskan pedagog koma til orða? Eru vit noydd at søkja uttan fyri okkara egna fakøkið fyri at læra, hvussu vit skulu skipa ein góðan stovn við trivnaði fyri børn? Ja, eg spyrji bara…

Eg havi arbeitt í barnagarði í Føroyum í hálvtfimta ár. Arbeitt í barnagarði, frítíðarskúla og næmingaheimi fyri deyv og tunghoyrd í Danmark. Eg havi aldri møtt einum heilsufrøðingi innan hesi øki. Tað kann væl hugsast, at tey hava sínar hugsanir um, hvussu trivnaðurin hjá børnum er, men hava tey royndirnar? Síggja tey, nær børn trívast ella mistrívast í gerandisdegnum? Hvør er tað sum sær hetta? Eru tað ikki vit, sum arbeiða á hesum økjum? Eru vit so bangin fyri at líta á okkara egnu eygu?

Eg haldi, at tað er upp á tíðina, at vit sum fakbólkur taka í egnan barm. Tað er gott at fáa nýggja kunning uttanlands, møguliga úr Danmark, har tey hava nógvar og drúgvar royndir innan gransking. Men tað eru donsk børn, sum eru kannað undir donskum viðurskiftum. Eg meini ikki, at alt úr Danmark ella aðrastaðni uttanlands skal kastast burtur, men eg haldi, at vit skulu vera meira kritisk. Vit hava lyndi til at taka alt til okkum, tí ein ella annar serkønur uttanlands sigur tað, uttan at geva okkum far um, hvørt hetta hóskar inn í okkara egnu viðurskifti.

Hvussu kunnu vit sum fakbólkur vænta, at nakar skal virða okkara fakøkið, tá vit ikki hava virðing fyri okkum sjálvum. Hví skulu pedagogar fáa meira í løn tá heilsufrøðingar o.o. mugu til fyri at læra okkum at ansa eftir børnum og skapa trivnað fyri tey?

Hetta sigi eg ikki fyri at seta niður á ráðstevnuna, sum júst hevur verið. Eg haldi, at ráðstevnan kann vera byrjanin til nakað, sum møguliga fer at seta eitt kjak í gongd her heima. Men eg meini, at tað er upp á tíðina, at vit bretta upp um armar og lata hoyra frá okkum. Tað nyttar einki at ganga av einari ráðstevnu til aðra, uttan at hava eitt kjak…



*Majbritt Jacobsen, pedagogur á dagstovninum á Argjum*

## Viðmerking

### til grein í Pedagogblaðnum frá mai 2004

Í sambandi við, at grein var at lesa um nýggja pedagogútbúgving í Pedagogblaðnum frá mai 2004, ynskja undirritaðu at gera niðanfyristandandi viðmerking/ískoyti:

Setningurin í nevndu grein Nevndarumboðini fyri pedagogútbúgvingina halda, at sjálv tíðin, sum næmingarnir eru í starvsvenjing, er rímilig, men tørvur er við neyvari málsetningi kann geva fatan av, at verandi starvsvenjing ikki er væl skipað. Í hesum sambandi má vísast á, at viðmerkingin gongur uppá, at tað er týdningarmikið við neyvum samanspæli millum starvsvenjingina og hinar partarnar av útbúgvingini. Víðari stendur í greinini: …tey sakna neyva eftirmeting av starvsvenjingarskeiðnum .

Hetta var meira meint uppá ein tørv á neyvari eftirmeting av útbúgvingini sum heild.

*Vinarliga*
*Petur Zachariassen*
*Kristianna Sjóvará Jacobsen*




Güettler, Helmsdal, Jónsdóttir:

**NEI!**
**segði lítla skrímsl**




**Ein bók um at tora at siga nei.**

**Væl egnað til upplesing og prát.**

Bókadeild Føroya Lærarafelags
Pedda við Steingøta 9
100 Tórshavn
Tel. 317644 Fax 319644
www.bfl.fo/bfl@bfl.fo

# Nýggjar barnabøkur

Tvær av bókunum, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út herfyri, eru smábarnabókin Spæl og mal eftir Emmu Dodd, og barnabókin Stóra bókin um Bibba eftir Barbro Lindgren og Evu Eriksson.




**Spæl og mal**

er ein stuttlig putli- og spælibók, har nógvir møguleikar eru at gnísta og lurta, mala og spæla. Bókin er 12 síður, við litføgrum myndum og stívari permu. Eyðna Magnussen týddi úr enskum. Bókin, ið er til tey heilt smáu, kostar 140 kr. í bókabúðunum. Føroyaprent hevur staðið fyri prentgerðini.




**Stóra bókin um Bibba**

er savn við trimum søgum um ribbaldin Bibba. Søgurnar eru: Ribbaldurin Bibbi og mamman. Ævintýrferðin hjá Bibba og Ribbaldurin Bibbi fær ein hund. Søgurnar um Bibba eru sera stuttligar, tær bera upp á rím, og Alexandur Kristiansen hevur hegnisliga týtt tær til føroyskt. Bókin, ið er væl egnað til tey 3-7 ára gomlu, er 86 síður við litmyndum, er innbundin og kostar 120 krónur í bókabúðunum. Føroyaprent hevur staðið fyri prentgerðini.

# Ikki eiti á pedagogar

*Hvad synes du så om Færøerne ?*
*Jo, I har nogle pragtfulde pædagoger heroppe .*

Torfinn Hentze - Nevndarlimur í Javna

Tað var ikki akkurát tað svarið, vit høvdu væntað, tá vit spurdu unga, glaða og skilagóða menningartarnaða mannin frá TV Glad úr Esbjerg: Hvad synes du så om Færøerne? Hann var saman við øðrum og vitjaði Javna og sat og hugnaði sær við borðið í javnahølunum. Vit høvdu væntað, at hann, sum vanligt var, at danir og aðrir útlendingar við gjørdu, fór at siga okkum, hvussu hugtikin hann var av fjøllunum, tí skiftandi landslagnum, ja, stutt sagt teirri stórbæru føroysku náttúruni. Alt var so nógv øðrvísi, enn hann var vanur við á flatlondum.

Men tað var nakað heilt annað, sum lá fremst í huga hansara. Hann hevði beint áðrenn vitjanina hjá Javna verið í sambandi við føroyskar pedagogar. Og tað hevði so fingið hann at koma við tí impulsiva svarinum: Jo, I har nogle pragtfulde pædagoger heroppe. Vit undraðust eina løtu á knappa, men áhugaverda svarið.

Tá vit høvdu summað okkum eitt sindur, máttu vit sjálvandi fáa hann at útgreina nærri, hvat hann meinti við. Jú hann hevði kent á sær, at føroysku pedagogarnir, umframt at vera fakliga dugnaligir, veruliga høvdu hjartað við í sínum arbeiði, og tað metta hann vera sera virðismikið. Hann var ikki so vanur við slíkt hjartalag á teimum pedagogunum, hann hevði verið vanur at vera saman við.

Mundu ikki fleiri av Javnafólkunum, sum vóru til staðar, merkja ein fjálgandi yl av góðum kenslum og nøgdsemi fara ígjøgnum seg av umrøðu hansara av føroysku pedagogunum og tí góða skoðsmáli, hann gav teimum.

Løgið, hvussu væl menningartarnað fólk duga at meta um, hvussu ektað fólk eru við tey, og um, hvussu hjartalagið er fyri teimum. Á hesum øki eru ringt at lumpa tey. Hetta verður ásannað ferð eftir ferð.

TV-Glad í Esbjerg er eitt lokalsjónvarp, har fólk við menningartarni gera sendingarnar, sjálvandi stuðlað av fólki, sum hava skil fyri slíkum.

At byrja við vóru tað nakrar eldsálir, sum høvdu tikið seg saman at hjálpa menningartarnaðum fólki at gera sjónvarpssendingar, tó uttan fíggjarligan stuðul av nøkrum slag. Eingin trúði, at hetta kundi bera til. Men tá tað seinni varð prógvað, at fólk við slíkum breki væl dugdu at gera áhugaverdar og dygdargóðar sendingar - sjálvandi við røttu stuðlunum, eydnaðist at fáa almennu myndugleikarnar at stuðla fíggjarliga.

Hesi fólk vitjaðu í Føroyum í arbeiðsørindum. Ætlaðu at gera onkrar sendingar hiðani. Stuttligt hevði verið, um vit kundu fingið høvi at sæð, hvat kom burturúr hjá teimum.




*Hugni í miðbýnum...*

4-10 Áarvegur · P.O. Box 107 · FO-110 Tórshavn
Faroe Islands · Tel +298 31 32 33 · Fax +298 31 52 50
hafnia@hafnia.fo · www.hafnia.fo
HOTEL HAFNIA

Framhald av síðu 13

teimum eru vaksin menningartarnað, og 80 teirra eru starvsfólk við familju. Starvsfólk búgva í sama húsi sum tey menningartarnaðu, tvs. umleið seks menningartarnað og eitt starvsfólk við familju búgva í sama húsið.

Í Newton Dee vóru fleiri verkstaðir, sum vit vitjaðu; har framleiddu tey ymiskar lutir, sum tey seldu ella sum tey brúktu í dagliga húsarhaldinum. Tey framleiddu m.a. heimskend træleiku. Tey høvdu ein jarnverkstað, ein timburverkstað, har tey gjørdu innbúgv, ein leikuverkstað, ein leirverkstað, ein dukkuverkstað, eitt bakarí og nógv annað. Man kundi eisini koma uttanífrá og keypa sær vistfrøðiligar vørur. Frá bakarínum keyptu fólk í økinum rundanum sítt breyð.

Í Newton Dee var stórt jarðarbrúk og djórahald, alt á vistfrøðiligum/biodynamiskum støði. Umframt alt hetta var ein matstova, har menningartarnað arbeiddu; tey gjørdu og seldu mat til fólk, sum komu framvið. Kondittarakøkurnar fingu tey frá bakarínum. Við síðuna av matstovuni vóru tveir handlar, ein við lutum, sum vóru framleiddir á ymisku verkstøðunum, og ein við matvørum, sum eisini vóru framleiddar í Newton Dee Village.

Tey vóru so at siga sjálvbjargin við øllum til húsarhaldið, og umframt hetta útfluttu tey vøru til handlar í Skotlandi og eisini úti í heiminum.

Tey menningartarnaðu, sum vit møttu í Newton Dee, vóru øll vaksin og mintu á mangan hátt um tey, vit kenna frá Verkstaðnum Vón. Ein munur var tó, at har búðu eisini folk við sosialum og sálarligum brekum. Hetta var smb. Vibeke Sunndal úr Danmark ikki heilt uttan trupulleikar. Vibeke greiddi frá, at har vóru fleiri starvsfólk úr Norðurlondum; tey arbeiddu har í fleiri ár og høvdu familjuna við sær. Børn teirra gingu á einum Rudolf Steiner skúla uttan fyri økið og vóru annars ein partur av Newton Dee.

Felags fyri øll støðini, sum vit vitjaðu, var, at fólk arbeiddu ikki fyri løn; tey fingu tað, teimum tørvaði av klæðum, mati og brúkslutum. Hvørt húskið ella hvør eind sær fekk eina pulju av pengum, sum tey so sínámillum samdust um, hvat skuldi brúkast til. Man kann søkja um loyvi at sleppa at arbeiða í Newton Dee; har er ein upptøkunevnd, sum viðger innkomnar umsóknir. Man verður settur í starv í einari royndartíð upp á 3 mánaðir, og um alt riggar væl, kann man so velja hetta sum sítt starv í longri ella styttri tíð.

Hetta var so bert eitt brot úr øllum tí, vit upplivdu í Skotlandi á hesum sinni. Tankar, sum hvørt møguleiki kundi verið fyri, at onkur vaksin við menningartarni kundi farið til Newton Dee at arbeitt í eina stutta tíð, hava streyfað meg. Hetta kundi verið gjørligt, um ein hjálpari fór við. Á tann hátt kundi man sloppið undan málsligum trupulleikum og verið eina stóra uppliving ríkari.

BABY & BARNAÚTGERÐ
...eitt sindur betri




Sera væl egnaðir til dagstovnar tá talan veruliga er um GÓÐSKU

Mát innan:
36 x 96

Vælkomin inn á gólvi har nærri upplýsingar fáast.
Vit geva fegin tilboð

Niels Finsensgøta 18 · 100 Tórshavn
31 51 01 · T-póstur: chess@post.olivant.fo

HeimaGreiðslan




**HeimaGreiðslan:** Kanna saldur · Fáa yvirlit yvir bókingar · Rinda rokningar og flyta pengar · Samskifta við kundaráðgevan · Søkja um lán · Greiða sparikassørindi uttanlands við fartelefon, teldu og internetsambandi · HeimaGreiðslan er ókeypis.

Vitja heimasíðuna www.sparikassin.fo og royn HeimaGreiðsluna.

Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

- Heildarveitari innan reinføri
- Dygdar ráðgeving og vegleiðing
- Vit flýggja vøruna út ókeypis og til tíðina
- Vit seta vøruna uppá pláss



SANSIR 355 355

Blika

- reinir serfrøðingar

Dustsúgvarar frá Nilfisk Advance setting standards

Sápa til øll endamál frá NOVADAN®

Pappír til øll endamál frá KATRIN®

Tel 35 66 66 · www.blika.fo
Fax 35 66 67 · Akranesgøta 9 · Postboks 316 · FO-110 Tórshavn
Kom og vitja okkara snotiligu høli og fá eitt prát

# BørneArtikler




## Bambolina Air Plus

giver barnet en hidtil ukendt frihed og bevægelighed, og sikrer at huden kan ånde. Bleen er fremstillet med en tekstillignende overflade, der føles både blød og behagelig.

| Variant | Indhold pr. krt. |
|---|---|
| Mini 3-6 kg | 180 stk. |
| Midi 6-11 kg | 168 stk. |
| Maxi 9-18 kg | 150 stk. |
| Junior 12-25 kg | 126 stk. |
| XL-plus 15-30 kg | 120 stk. |



**Kampagnetilbud**

Pr. krt.

**Kr. 179,-**

### Håndsæbe

Varenr. 6661
Indhold 500 ml.
6 stk. pr. karton
1 krt. **kr. 171,50**





### Håndcreme

Varenr. 6656
Indhold 500 ml.
4 stk. pr. krt.
1 krt. **kr. 192,50,-**



### Zinksalve

Varenr. 6660
Indhold 100 ml.
6 stk. pr. krt.
1 krt. **kr. 186,50,-**



### Skumvaskeklude

Varenr. 4984
1 krt. = 40 pk. á 100 stk.
1 krt. **kr. 488,-**

# RengøringsPakke







- 1 tørmopsætbestående af 1 velcrofremfører,
- 1 teleskopskaft og 5 tørmopper.
- 1 Rengøringspakke m/duft (5 ltr. Universal rengøringsmiddel med duft, 5 ltr. sanitet rengøringsmiddel m/ duft, 5 ltr. gulvpleje m/ duft. 2 l Bio opvaskemiddel, 9 stk. microfiberklude. 2 stk. Rensesvamp, stål. 2 stk. Opvaskebørste.)
- Vileda Quick Mop, komplet.
- 10 ltr. Flydende håndsæbe.
- 1 sæbedispenser, plast



For hele pakken:

**Kr. 980,-**



ARCTIC IMPORT

**Arctic Import Føroyar**
Kontor Færøerne kl. 10.00 - 14.00
Annika Jacobsen
Tlf. 42 28 50
Kontor Danmark
Tlf. +45 96 32 19 00

**Arctic Import A/S**
Tagholm 12 - Box 120
DK-9400 Nørresundby
Tlf. 96 32 19 00
Fax 96 32 19 10
info@arcticimport.dk
www.arcticimport.dk

Priserne er gældende til 30.11.04 og er eksl. fragt, forsikring og mvg. samt evt. told/afgifter.
Fragtomk. for en palle Bambolina m/20 krt. er kr. 830,-. Leveret DDU



# Týpan...

***Her er Heini. Hann er stjóri. Heini er troyttur av (á)ganginum á skrivstovuni, og nú vil hann hava frid. Heini er týpiska ímyndin av, at tad hevdi loyst seg hjá honum at hugsad meira um røttu trygdina hjá sær og starvsfólkunum.***

***Føroya Lívstrygging kann bjóda eina trygd, id júst er grundad á avtalu millum leidslu og starvsfólk. Skipanin eitur Virkiseftirløn og er ein skraddaraseymad loysn vid bædi trygging og eftirløn.***

Virkiseftirløn er ein eftirlønarskipan við innbygdari trygging.
Virkiseftirløn er grundað á, at ein partur av lønini verður goldin inn í skipanina.
Tá ið eftirlønin verður goldin út, ræður starvsfólkið sjálvt fyri, hvussu hetta skal gerast.
Veljast kann ímillum at fáa alt goldið út í einum ella sum mánaðargjald.

Hann er stjóri

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn · Tel 311111 · Faks 351110
heimasíða www.liv.fo · teldupostur liv@liv.fo

LÍV
Føroya Lívstrygging